# Færri avreiðingar og minni virði

Tølini fyri avreiðingar um avreiðingarskipanina fyrstu fimm mánaðirnar í ár vísa, at bæði nøgdin og virðið er minkað í mun til sama tíðarskeið 2007. Avreiðingarnøgdin er samantalt minkað umleið 4.100 tons ella 8% og virðið um 91 milliónir, sum er á leið 18%. Minkingin í nøgd og virði í mun til 2007 var størri fyrr í ár enn hon er nú. Fyrstu mánaðirnar á árinum kundi staðfestast ein minking í nøgd og virði á ávikavist 24 og 25%. Av teimum mest týðandi fiskasløgunum eru tað hýsan og havtaskan, sum vísa størstu minkingina. Avreiðingarvirðið á hesum fiskasløgum er nærum minkað niður í helvt og avreiðingarnøgdin um 40%. Tað koma nógv fleiri tons av svartkalva uppá land í ár mun til sama tíðarskeið í fjør. Avreiðingarvirðið á nevnda fiskaslagi er eisini økt um 13 milliónir ella 216%. Eisini kann nevnast at meira av brosmu og longu er komið uppá land í ár mun til 2007, ávikavist 20 og 24%.



# úr gott handverk



*- Vit hava verið stak væl nøgd við Thor Alpha, sum er nýbygningur á Skála Skipasmiðju nummar 56. Skipið hevur roynst sera væl, og vit ivast onga løtu í, at vit fáa eitt eins gott skip í nýbygningi nummar 57, siga tey í Hósvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

shore og support, sum tað verður rópt á fakmáli.

Á skrivstovuni hjá Thor eru tey sera fegin um, at hesi skip kundu smíðast á føroyskari skipasmiðju.

- Vit hava fingið eitt serstakliga gott handverk. Hóast póllendingar hava staðið fyri meginpartinum av stálarbeiðnum, er einki at ivast í, at slíkar verkætlanir eru við til at bera føroyska vinnu fram, samstundis sum hetta gevur samfelagnum nýggjar møguleikar og avbjóðingar.

Alternativið til avtaluna millum Skála Skipasmiðju, Landsfelag Handverkaranna og pólsku skipasmiðjuna hevði verið, at skrokkurin varð smíðaður í Póllandi ella øðrum landi.

- Nú er alt arbeiðið í staðin gjørt her heima, og tað gevurpositivarringvirkningar í samfelagnum.

Tá Thor Alpha varð navngivin og latin eigarunum, vórðu nógv rósandi orð søgd um avtaluna, sum Landsfelag Handverkaranna á sinni gjørdi við Skála Skipasmiðju.

- Uttan hesa avtalu og forstáilsi millum partarnar, vóru Thor-skipini ikki smíðaði á føroyskari skipasmiðju, vóru fólk samd um.

Á skrivstovuni hjá Thor í Hósvík siga tey, at tað hevur verið nakað dýrari at smíðað skipini í Føroyum, men afturfyri hevur felagið fingið eitt dygdargott handverk.

Thor í Hósvík hevur út við 400 fólk í starvi í fiskiog frálandavinnu, og á skrivstovu felagsins starvast eini 20 fólk.



*Skipaferðsla, flogferðsla og onnur ferðsla líður undir høgu oljuprísunum* *Mynd: FiskeribladetFiskaren*

# Oljuprísirnir farnir um »pínumarkið«

**Prísurin á norðsjóvarolju fór upp um 142 dollarar fyri tunnuna í síðstu viku, og hetta er met, sigur oljuanalytikarin, Rikard Hammer**

OLJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Trongur og órógvandi marknaður, minkandi framleiðsla uttanfyri OPEC og stórur eftirspurningur, serliga í Kina.

Hetta er orsøkin til, at eftirspurningurin eftir olju er so stórur.

Tað sigur oljuanalytikarin, Rikard Hammer við Aftonbladet.

Hann vísir á, at órógv í londum sum Nigeria, Irak og Meksiko økir eisini um prísirnar.

Rikard væntar, at prísirnir fara at fella nakað aftur í summar orsakað av einum meira hóvligum eftirspurningi og veksandi framleiðslu í OPEC.

- Tað er ómøguligt at spáa um, hvussu høgir prísirnir kunnu gerast, tí oljuprísirnir hækka eisini orsakað av ótta og framleiðsluórógvi.

Rikard Hammer væntar ikki, at høgu oljuprísirnir fara at halda sær í longdini og heldur, at prísirnir eru farnir um pínumarkið í mun til, hvat heimurin megnar.

Kortini væntar oljuanalytikarin, at prísirnir fara at hækka nakað aftrat, áðrenn teir fara at fella aftur.

Forsetin í OPEC, Chakib Khelil, sigur í eini samrøðu, at oljuprísirnir helst fara at koma upp á 170 dollarar fyri tunnuna.

Chakib Khelil væntar, at eftirspurningurin eftir olju fer at veksa, samstundis sum dollarin framhaldandi fer at fella.

# Atlantic Explorer skjótt klárur at loysa

**Eldurin í maskinrúminum umborð á seismikkskipinum Atlantic Explorer var ikki so umfatandi, sum hildið varð í fyrstani**

ELDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá eldur kom í seismikkskipið í norskum sjógvi í síðstu viku, tók Thor Provider hjá Thor í Hósvík, sum var fylgiskip hjá Atlantic Explorer, meginpartin av manningini umborð. Eftir umborð á seismikkskipinum var trygdarmanningin, sum basti eldinum eftir nøkrum tímum.

Sambært FiskeribladetFiskaren fór Atlantic Explorer úr Troms í gjár og byrjar ætlandi at skjóta seismikk aftur í komandi viku.

Tað er norska oljuumsitingin, sum er í holt við at savna inn tað, sum rópt verður 3D-seismikk í Troms II.

Seismiska savningin av data skuldi ætlandi byrja 24. juni, men mátti útsetast orsakað av eldinum umborð á Atlantic Explorer.

Nú hevur oljuumsitingin í Noregi fingið at vita, at eldskaðarnir eru minni umfatandi enn hildið. Hetta merkir, at Atlantic Explorer byrjar aftur sítt virksemið fyrst í juli, og síðan verður hesin parturin av verkætlanini liðugur 31. juli.

Thor Provider, sum tók meginpartin av manningini av seismikkskipinum, er chartrað av altjóða seismikkfelagnum PGS, sum ger seismiskar kanningar við Atlantic Explorer.



*Atlantic Explorer fer aftur at skjóta seismikk í komandi viku*

*Mynd: FiskeribladetFiskaren*